# *Móttøka*

*Í samband við, at Sofus Clementsen tók við starvinum sum stjóri á Pf. Postverk Føroya 1. oktober 2006, verður almenn móttøka á Frímerkjadeildini, Traðargøta 38, Argir, fríggjadagin 17. november 2006 frá kl. 16.00 til 18.00*



*Nevndin í Pf. Postverk Føroya*

Postverk Føroya

---

P/F TANGAVIRKIÐ

## Starvsfólk til okkara umsiting.

Søkt verður eftir fólki (m/k) til umsiting okkara (skrivstova og handil) at byrja skjótast gjørligt.

**Starvslýsing:**
Starvið umfatar bókhald, debitor- og kreditorrøkt, innkeyp til- og søla úr handlinum og arbeiði í tí sambandi.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta av tær, at tú er jaligur, fyrikomandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Eisini rokna vit við, at tú hevur í minsta lagi grundleggjandi teldukunnleika.

**Setanatreytir:**
Starvið er heiltíðarstarv. Løn og setanarviðurskifti eftir avtalu.

Nærri fæst at vita um starvið, við at venda sær til Mortan Mortensen, tlf. 573065.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum v.m. verður at senda inna 20. november 2006 til:

**P/F Tangavirkið**
**900 Vágur**

*P/F Tangavirkið hevur í dag uml. 10 fólk í arbeiði, ið starvast í einari vælútgjørdari nýmótans smiðju.*

---




Sum skrivstovufólk á Fiskamarknaðinum hevur tú ymiskar uppgávur um hendi.

Uppgávurnar eru m.a.
- at svara telefonini og avgreiða kundar yvir telefonina
- inntastan av veiðutølum
- uppger av avreiðingum
- support til uppboðssøluhaldaran
- aðrar fyrifallandi uppgávur

Starvið verður skipað sum hálvtíðarstarv, frá kl. 8:00–12:00, tó við eitt sindur av flexibiliteti, tá uppboðsølan varðar longri.

Vit rokna við at tú
- hevur teldukunnleika á brúkarastigi (bæði Windows og DOS)
- hevur hóskandi útbúgving (skrivstovuútb. e.l)
- ert ágrýtin og hevur góðan røkjuskap
- hevur góð samstarvsevnir og góðan tænastuhugburð

Umsóknarfreistin er 22. november 2006, og starvið verður sett skjótast gjørligt. Send umsóknina við próvskjølum og møguligum viðmælum til:

*P/F Faroe Fish Market, att: Jens Chr. Olsen, Toftagjógv 3, FO-650 Toftir.*

Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú venda tær til Jens Chr. Olsen á telefon 41 41 41 ella teldupostið jens@fmf.fo

KREA.FO 478080

FISKAMARKNAÐUR FØROYA
FAROE FISH MARKET

---

# Skattalistin fyri 2005

Skattalistin fyri Vágs kommunu liggur frammi til alment eftirlit á Býráðsskrivstovuni frá 20 november. til 4. desember 2006.

Skrivstovan er opin:
mánadag-fríggjadag kl. 9.00-16.00.

**Vágs kommuna**

---

# Skattalistin fyri 2005

Skattalistin liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í vanligari skrivstovutíð frá 15. til 29. november – báðir dagar íroknaðir.

**Vestmanna Kommuna**

---

# Stuðulsfólk til Dagstovnin í Kvívík

Dagstovnurin í Kvívík søkir stuðulsfólk, 25 tímar um vikuna, at byrja 1. desember 2006, ella eftir nærri avtalu.

Tað er í barnagarðsbólkinum, sum stuðulsfólkið kemur at hava sína uppgávur, og ganga har 20 børn í aldrinum 3 til 5 ár.

Vit kunnu bjóða hugnaligar arbeiðsumstøður, fitt og krevjandi børn og góðar starvsfelagar. Innandura hava vit ikki nógv pláss, men vit hava góðar møguleikar fyri at brúka náttúruna í nærumhvørvinum.

Okkara mál við arbeiðinum er, at skapa tryggar og mennandi umstøður fyri børn og vaksin innanfyri teir karmar, sum kommunan setur fyri virksemi okkara.

Vit ynskja umsøkjarar við royndum, hugi at arbeiða við børnum, hugflogi og løttum sinnalag.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Umsóknir skulu vera stovninum í hendi innan 20. november 2006.

Meira kann fáast at vita um starvið, við at venda sær til Siborg Arge, leiðara á tlf. 214360

**Kvívíkar kommuna**
Víkarvegur 4
FO-340 Kvívík